# BÓKASÍÐAN

*bøkur, bøkur, bøkur...*



*Ritstjórn: Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

## Fyrstu ferð

Ian McEwan, *On Chesil Beach*, Random House, 2007

So er Ian McEwan aftur á bananum við eini bók, og takk havi hann fyri tað. Skaldsøgan, *On Chesil Beach,* sum verður týdd til danskt í løtuni, er onki minni enn ein perla í ritverkinum.

Lesarar vóru ikki sørt ovfarnir, tá teir varnaðust, at nýggja skaldsøgan hjá McEwan snýr seg um nakað so tugt sum "fyrstu ferð". Men, sum vanligt, løðir McEwan hendingina við stórum týdningum um lívið og kærleikan – serliga tann, sum fór til spillis.

Tað er eitt summarkvøld í 1962. Florence og Edward eru júst gift og eru ómetaliga forelskaði í hvørjumøðrum. Tey eru bæði 22 ár, men hvørgin teirra hevur nakrantíð verið í song við nøkrum. Fyri framman bíðar nú brúðarnáttin, og Florence er nærum ræðslusligin við tankan. Edward gongur hinvegin út frá, at hon gleðir seg líka nógv sum hann.

Uttan at avdúka alt ov nógv, kann sigast, at alt, sum yvirhøvur kann ganga galið á brúðarnáttini, gongur galið. Og McEwan sparir okkum ikki fyri neyvt detaljeraðar lýsingar av, hvat tað er, tey bæði trilvandi ungu ikki finna út av.

*On Chesil Beach* hevur okkurt ævintýrkent við sær, sum gevur lesaranum varhuga av, at alt er avgjørt frammanundan. Eg skal ikki avdúka, hvat søgan endar við. Bert siga, at minniliga brúðarnáttin kemur at avgera lívið hjá teimum báðum ungu framyvir




*On Chesil Beach avdúkar náðileyst, hvussu illa tað kann ganga "fyrstu ferð"*

# Bøkurnar og eg

## Heini í Skorini, lesandi



*Heini í Skorini gerst tungur í huga við tankan um allar tær bøkur, hann ongantíð fær lisið, tí lívið heilt einfalt er ov stutt*

*(Mynd: Álvur Haraldsen)*

*Hvørja bók lesur tú í løtuni?*
- Eg havi tann (ó)vana at lesa einar tvær til tríggjar bøkur í senn, alt eftir hvørjum lagi eg eri í. Fakbøkur fara við mestu tíðini, og ovasta bókin á skrivaraborðinum beint nú eitur *Religion and Politics in the International System Today.* Men tá eg ikki eri í tí fakliga horninum, eru vísdómsorðini hjá Dalai Lama altíð góð at tríva í. Einføld og banal, men kortini djúp og sonn. Og so eri eg júst farin í holt við bókina *Being Arab* hjá martýrinum og libanesiska topp-journalistinum Samir Kassir, sum varð myrdur í 2005 orsakað av hesi somu bók. Helst av sýrisku fregnartænastuni.

*Er tað onkur bók, tú minnist serliga væl?*
- Ja, fleiri. Fyrsta bókin, eg las hjá tibetanska leiðaranum Dalai Lama við heitinum *The Art of Happiness* (á donskum *Kunsten at leve lykkeligt),* hevði stóra ávirkan á meg. Eg gloymi heldur ikki grundbókina hjá okkum í filosofi í Hoydølum, har ein nýggjur heimur varð opnaður okkum næmingum. Endurminningarnar úr týningarlegum nazistanna hjá týska sálarfrøðinginum Viktor Frankl standa eisini klár í huganum. Hann skifti seksuellu girndina hjá Freud út við viljan til meining, innihald og endamál sum menniskjunnar grundleggjandi drift. Ævisøgan hjá suðurafrikanska biskuppinum Desmond Tutu og essay-søvnini hjá danska rithøvundanum Carsten Jensen eru eisini frammarlaga í huganum (og so havi eg helst gloymt fleiri).

*Hvør var tín fyrsta lesiuppliving?*
- Eg gloymi ongantíð bøkurnar um sjórænaran Magnus Heinason, sum eg las tíðliga í fólkaskúlanum. Hann var – saman við babba og Kára Reynheim – mítt fyrsta føroyska idol (hóast teir tríggir annars ikki líkjast so nógv, hehe).

*Hvørja bók vildi tú ynskt, tú hevði lisið?*
- Puha. Hatta er ein deprimerandi spurningur. Eg gerist altíð hugtungur av at hugsa um alt tað, sum eg ikki havi lisið. Og enn verri: Alt tað, sum eg ongantíð fari at lesa, tí lívið heilt einfalt er ov stutt. Eg eri ongantíð veruliga komin til klassikarar sum Dostojevskij, Kierkegaard og Nietzsche bara fyri at nevna nakrar fáar úr rúgvuni. Tað er sanniliga munur á at lesa um teir og so at lesa teirra egnu og torskildu verk.

- Og so liggja eisini á láni tær mongu politisku ævisøgurnar hjá t.d. Nelson Mandela, Lech Walesa, Mahatma Ghandi og Martin Luther King. Næst á breddanum hjá mær er kortini *The End of Faith* hjá amerikanska ateistinum Sam Harris. Ein bók, sum hevur volt mikið kjak í USA.

*Hondina á hjarta – lesur tú altíð eina bók lidna?*
- Nei. Eg eri so mikið ótolin og rastleysur, at ein bók helst skal fanga meg rímiliga skjótt. Um eg ikki eri bergtikin, tá eg komi til síðu 70, havi eg lyndi til at tveita hana frá mær og byrja uppá eina nýggja. Tað var kanska mín trupulleiki við *Ó* hjá Carli, he, he...

*Er tað okkurt slag av bókum, tú ikki tímir at brúka tíð uppá?*
- Hópframleiddu bøkurnar um føroyskar skiparar og reiðarar tendra meg ikki (sorry Jústinus!). Kanska tí handan sjangran í størri mun appelerar til eitt annað ættarlið, tá fiskiskapur og fiskivinnan tóktist vera "nærri" fólkinum.

- Og so má eg nevna allar hesar nýggju "lívsstílsbøkurnar" og "sjálvhjálparbøkurnar". Hesar vegleiðingarnar til eitt eydnuríkari lív, sum útlendskir bókhandlar eru á tremur við, og sum stinka langan veg av eini ultramaterialistiskari og yvirfladiskari tilverufatan, sum yvirhøvur ikki ger nakað menniskjað lukkuligari. Tá er munur á Dalai Lama.

## Kvinnur og list

Kristín Marja Baldursdóttir, *Karitas uden titel,* Gyldendal, 2007

Íslendska skaldsøgan *Karitas án titils* eftir Kristín Marja Baldursdóttir, ið var í uppskotið til Bókamentavirðisløn Norðurlanda Ráðsins í fjør, er nú umsíðir týdd til danskt.

Karitas vaksur upp í Íslandi fyrst í 1900 talinum saman við fimm systkjum og mammuni. Pápin er deyður á sjónum, og mamman hevur sett sær fyri, at øll børnini skulu hava eina útbúgving.

Karitas vísir eg skjótt at hava heilt serligar listarligar gávur. Hon fær møguleika at fara til Keypmannahavnar at nema sær listarliga útbúgving. Heimafturkomin gleðir hon seg til eitt lív sum listakvinna, men so forelskar hon seg í tí vakra Sigmar. Dreymurin verður tí av ongum, og Karitas verður enn eitt offur fyri einum hugburði, ið ikki loyvdi kvinnum at fáast við list.

*Karitas uden titel* minnir nógv um stóru realistisku ættarskaldsøgurnar frá 1800 talinum. Hetta merkir tó ikki, at søgan er gamaldags. Heldur spælir høvundurin sær við genruna við at bróta familjusøguna við lýsingum av djúpt persónligu listaverkunum hjá Karitas.

Hóast sín myrka karm, er bókin á ongan hátt tung ella hátíðarlig. Tvørturímóti er søgan full av humor og ironi, sum eisni eru eyðkenni fyri størsta partin av ritverkinum hjá íslendsku Kristín Marja Baldursdóttir.




*Karitas uden titel minnir um stórfingnu ættarskaldsøgurnar frá 1800 talinum*